## Johannis skal venja MB

Komandi kappingarár skal Johannis Joensen venja besta mansliðið hjá Miðvágs Bóltfelag, sum í ár flutti úr 1. niður í 2. deild, men helst skjótt ætlar sær uppaftur. Johannis er sum fótbóltsspælari uppvaksin í MB, men hevur eisini spælt við havnarfeløgunum, HB og B36, umframt at hann hevur spælt við A-landsliðnum. Síðsta árið hevur hann spælt við næstbesta liðnum hjá 07 Vestur.



## Brotsspark bjargaði Liverpool

Hagtølini søgdu, at Liverpool hevði bóltin 78% av tíðini. At Birmingham bert hevði fimm royndir móti málinum sammett við tær 35 hjá Liverpool, men hetta munaði lítið, tá avtornaði. Alt tóktist annars ganga sína kós, tá Ngog legði Liverpool á odda, men mál frá Benitez og Jerome løgdu gestirnar framum. Eftir steðgin hevði Birmingham ikki eina tí einastu roynd móti málinum hjá Liverpool, men kortini skuldi eitt meira enn bara ivasamt brotsspark til, áðrenn javnvág kom í málroknskapin. Ngog fór umkoll í brotsteiginum, og hóast Birmingham-spælararnir mótmæltu, so helt dómarin fast um sítt, og so kundi Gerrard smekka leðurkúluna í netið, soleiðis at Liverpool slapp undan fullkomnu eyðmýkingini.

# Kristian Sune vann Haldor Holm Cup

**Seinasta vikuskiftið varð aftur lagt til brots í føroyskum billardspæli. Hol varð sett á eitt nýtt billardár. Og sum vanligur siður hevur verið í samfull 20 ár varð lagt út við kappingini um Haldor Holm steypið**

BILLARD
*Tíðindaskriv*



Kristian Sune Høgnesen vann gull, Jógvan Jørgensen silvur og Steinbjørn í Dali bronsu í Haldor Holm Cup

Kappingin er ætlað sum ein upphiting til Føroyameistarakappingina, sum byrjar í desember og heldur fram til páskir. Tað var Billardsamband Føroya, sum lat eitt stórt steyp, sum tó ikki kundi vinnast til ognar, men skuldi hava heimstað í Klaksvík, har Haldor Holm, sáli gjørdi eitt slóðbrótandi arbeiði til frama fyri billardspælinum.

Kappast varð fyrstu ferð í 1989 og hevur málið verið, at fimm av landsins bestu spælarum frá seinastu FM kapping skuldu vera við í hesi kappingini. Og so varð eisini í ár, tó at fleiri frámeldingar vórðu. Eitt nú vóru hvørki stórspælarar sum Sonhard Johannessen ella Max Rasmussen við vegna forfall.

Tað var við ikki sørt av sorgblídni, at kappingin fór fram á hesum 20 ári uttan fyri Klaksvíkar Klubba, har hon hevur verið hildin øll undanfarnu árini. Billardspælarar í Klaksvík hava tikið stig til at fáa egin høli í Fossagøtu, sum liggur millum Klaksvíkar Klubba og KÍ høllina. Hølini eru innrættað til at hýsa einum billardborði umframt at góðar og hugnaligar umstøður eru til áskoðarar og til hugnaliga samveru. Hóast sorgblídni so var kortini ein gleðisrómur at hava fingið eini høli, sum burturav eru ætlað til billardspæl.

Borðið er annars tað sama sum øll árini spælt hevur verið billard á í Klaksvík, síðani fyrst í 70-árunum, tá táverandi kommunulæknin í Klaksvík saman við øðrum tók stig til at fáa billardborð.

Kappingin hesaferð gekk væl og riggaðu nýggju hølini sera væl. Ikki óvantað gjørdist verandi Føroyameistari, Kristian Sune Høgnesen vinnari av kappingini. Hann hevur vunnið kappingina tilsamans fimm ferðir, annaðhvørt ár síðani ár 2000. Kristian Sune hevði umleið 30 eygu í meðal og var so nógv bestur. Hann átti eisini besta spælið og besta umfarið.

Kappingin um 2. og 3. plássið gjørdist tó ein gysari. Jan Müller, Steinbjørn í Dali og Jógvan Jørgensen løgu lið um lið nærum alla kappingina, og avgerðin fall ikki fyrr enn tí seinasta dystinum. Jan hevði sera góðan møguleika at vinna, tá hann spældi seinasta dystin og skuldi hava 430 eygu. Væl gekk í hond frá byrjan, men móti endanum dragnaði tað hjá honum og endin varð, at tað restaðu 30 eygu í til 2. plássið og 8 eygu í til 3. plássið. Tá avtornaði gjørdist Jógvan Jørgensen nr. 2 og Steinbjørn í Dali nr. 3.

Føroya Bjór stuðlaði kappingini og hevur gjørt tað øll hesi árini.



Kristian Sune Høgnesen vinnari av Haldor Holm Cup fyri fimtu ferð her í nýggju hølunum hjá Klaksvíkar Billardfelag



Símun Gullaksen, marknaðarleiðari hjá Føroya Bjór, handar Kristian Suna Høgnesen vinnarasteypið